## Tøkk

Eina hjartans tøkk vilja vit bera fram fyri stóru samkensluna og hjálpsemið, ið var víst, tá mín kæri maður, okkara góði faðir, verfaðir, abbi og langabbi.

**Jóhannes Olsen**
úr Sandavági

var sjúkur, doyði og varð jarðaður.

Tøkk øll tit, ið á ymsan hátt vóru um hann bæði heima og ta stuttu tíðina á Ellisheiminum.

Tøkk til David Jóhannesen fyri góð orð á Ellisheiminum. Tøkk til kórið fyri sera væl framborna sálmin og samkomuna fyri yndisligan felagssang, og tøkk til Ingu Poulsen Dam fyri ta sera vøkru taluna.

Tøkk tit, ið hjálptu okkum so væl við øllum í samband við jarðarferðina.

Tøkk fyri kransar, blómur, gávur til »Saron« og til tykkum, sum við heilsum vístu samkenslu.

Tøkk til sangarar, kirkjutænarar og til tykkum mongu, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað her á foldum.

Hjartans tøkk øll somul.

*Vegna tey avvarandi*
**Estrid, Knút. Eileen, Sigfríður, Einar og Annika við familjum**

# Møtir og fótbóltur í KFUM og K

**Undir heitinum, "Fylg mær", skipar KFUM og K fyri einum spennandi ungdómsvikuskifti í Klaksvík. Á skránni verða møtir, bíbliutímar, konsert og fótbóltskapping. Ætlanin er, at vikuskiftið skal verða ein blandingur av LUS og einari legu**

MØTIR OG TILTØK
*Rúna Sivertsen*



*KFUM og K skipar fyri spennandi og fjølbroyttum ungdómsvikuskifti í Klaksvík í døgunum 24. til 27. apríl*

Tiltakið byrjar hóskvøldið 24. og heldur fram til sunnukvøldið tann 27. apríl.

Umframt bíbliutímar, møtir og kensertir, verður eisini ítróttur á skránni. Møguleiki verður eisini at fara gongutúr, svimja, spæla flogbólt ella fótbólt.

Tey, ið ikki vita sær innivist kunnu gista hjá privatum. Eisini er møguleiki at sova í KFUM, men plássið har er avmarkað.

Skráin fyri vikuskiftið er at finna á www.jesus.fo, har eisini ber til at tekna seg til ungdómsvikuskiftismøtini.

## Skráin:

Hósdagin
Kl. 20.00: Bíbliutími v/ Hilmar Danielsen

Fríggjadagin
Kl. 19.30: Møti við Bergur D. Joensen
Evni: "Fylg mær!"
Sangur: Gospelkórið Gleði
Kl. 23.00: Konsert við VOX

Leygardagin
Kl. 09.00: Morgunmatur
Kl. 10.00: Bíbliutími við Bergur D. Joensen
Evni: "Fylg mær - hvussu?"
Kl. 13.00: Døgurði
Kl. 14-18: Ítriv: Fótbóltur, flogbóltur, svimjing og gongutúr.
Áhugatímar
Kl. 18.00: Náttveri
Kl. 20.00: Ungdómsguðstænasta við Hans Kristian Jóhannesen
Kl .23.00: Sang og vitniløta
ASKAM luttekur
Hugni...

Sunnudagin
Kl. 09.30 Morgunmatur
Kl. 11.00: Guðstænasta við altargongd
- Vikuskiftismøtini alment liðug.
Kl. 14.00: Familjumøti
Kl. 18.00: Møti við Pól Jóhannesen
Sangur: Barnakórið
Kl. 21.00: Sang ov vitniløta

## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri ta stóru samkenslu og hjálpsemi, sum víst var okkum tá okkara kæra móðir, systir, svigerinda, mostur, fastur og ommide

**Poulina Thomsen**
Skopun

lá sjúk, doyði og varð jarðað.

Tøkk øll tit, sum vóru um hana meðan hon var sjúk.

Tøkk leiðslan í heimarøktini, heimasjúkrasystrar og stuðlarnir Gunnhild, Helena, Oddvør og Elisabeth. Tit vóru ein stór hjálp í neyðini. Takk prestur fyri beinasemi og vælvald og troystarrík orð í heiminum og kirkjuni. Takk berarar, sangarar, gravarar og tit, sum skipaðu fyri ervinum og øll tit, sum á einhvønn hátt hjalptu til, meðan hon lá sjúk, doyði og varð jarða og ikki minst aftaná, nú tómrúmið er vorið so stórt, og lívið skal livast víðari.

Takk øll tit mongu, sum flygdu henni til hennara seinasta hvíldarstað her á fold. Takk fyri kransar, blómur og peningagávur til børnini.

*Vegna tey avvarandi*
**Ásbjørg, Jógvan Petur, Tórhallur, Emy, Ronny, René og Malla**

## Tøkk

Hjartans tøkk fyri sýnda samkenslu, tá ið elskaða mamma, vermamma og omma okkara

**Anna Hansen**
**Norðdepli**

doyði og var jarðað.

Takk fyri blómur, kransar og peningagávur.
Takk til tykkum øll, sum á ymiskan hátt hjálptu til við jarðarferðina.
Takk fyri troystarrík orð og til tykkum mongu, sum ringdu og luttóku í stóra sakni okkara.
Takk til heimahjáparanar og til tykkum øll, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunar vegna*
**Mary, Steinfinn, Christina, Poul Jóhan, Kristian og Karstin**

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at okkara kæri pápi, verfaðir, abbi, langabbi og vinur mín

**Robert Brockie**
vanliga nevndur Bobby
Tórshavn

andaðist sunnudagin 13. apríl á Landssjúkrahúsinum, 76 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni mikudagin 16. apríl kl. 13.00.

*Familjunnar vegna*
**Alan, Derek, Edna, Robbie, Ian og Frynhild**



# Páskakonsertir í Miðvági og í Vestmanna

**Skírisdag hava Vágakórið og Vestmanna Sangkór felags páskakonsert**

VESTMANNA SANGKÓR OG VÁGAKÓRIÐ
*Tíðindaskriv*



Skírisdag hava Vágakórið og Vestmanna Sangkór felags páskakonsert. Tann fyrra konsertin verður í Miðvágs kirkju kl. 15.00, og tann seinna verður í Vestmanna kirkju kl. 19.00.

Á konsertini framføra kórini saman brot úr tveimum gitnum verkum - tað eina er Missa Brevis hjá W.A. Mozart (1756-1791), og hitt er Requiem hjá Gabriel Fauré (1845-1924).

Mozart skrivaði Missa Brevis í d fyri soli, kór, orkestur og orgul í 1769, tá hann var bert 13 ára gamal. Hetta gjørdi hann eftir 9 døgum. Heitið Missa Brevis (tann stutta messan) vísir at hetta er kirkjutónleikur við lítlum orkestri, sum er nóg stuttur til vanliga (tátíðar) sunnudags gudstænastur. Satsir í messum tá høvdu hesar 6 tættirnar: Kyrie, Gloria, Credo, Sanctus, Benedictus og Agnus Dei.

Requiem eftir Gabriel Fauré er frá 1893. Satsirnir eru Introit og Kyrie, Offertorium, Sanctus, Pie Jesu (sopran solo), Agnus Dei, Libera me (bariton solo og kór) og In Paradisum.

Requiem er heiti á katólskari messu fyri teimum deyðu. Navnið kemur av fyrsta orðinum í introitus (innganginum). Kendastu tónaskøldini hava skrivað Requiem, men eru tey ofta ætlað til konsertnýtslu, sum t.d. Mozart, Verdi, Berlioz og Bruckner, meðan Requiem hjá Fauréé varð skrivað til at framføra í kirkjuni til jarðarferð (ein upprunalig styttri útgáva við 4 satsum).

Úr Missa Brevis hjá Mozart framføra Vestmanna Sangkór og Vágakórið satsirnar Kyrie og Agnus Dei, og úr Requiem hjá Fauré satsirnar Introitus og Kyrie, Pie Jesu (við kvinnukóri) og Libera me.

Helga Gerðalíð spælir orgul til hesi bæði verkini - skotbráið gjørdist ov stutt til at fáa orkestur til framførsluna.

Umframt hesi verkini framføra kórini nakrar kendar føroyskar páskasálmar. Tað eru fyri blandað kór: So stillan Jesus gongur, Guð mín, Guð mín, hví fórt tú frá mær og Gakk undir Jesu kross at stá. Hesin seinasti er skipaður sum veksilsangur millum blandað kór, kórkvartett og kirkjufólkið. Stíg seggur oman Golgata er fyri manskór, og Grøvin sterkað rivnað er, er fyri kvinnukór.

Kórleiðari er Kári Bæk og hjálparvenjari er Steven Foggin. Kári stjórnar vanliga Vestmanna Sangkórið og Steven Vágakórinum.

Øll eru hjartaliga vælkomin.


FISKIVINNUSKÚLIN Í VESTMANNA

**Tímalærarar til Fiskivinnuskúlan**

Søkt verður eftir tímalærarum at byrja á Fiskivinnuskúlanum 1. august 2003 í hesum lærugreinum:

- Týskt C-stig (4 t/v)
- Enskt C- og B-stig (4 + 4 t/v)
- Samfelagsfrøði C-stig (3 t/v)
- Alis-/evnafrøði C-stig (4 t/v)
- Evnafrøði B-stig (5 t/v)
- Støddfrøði C- og B-stig (5 + 5 t/v)
- Sølubúskapur B-stig (4 t/v)
- Matvøruframleiðslutøkni B-stig (4 t/v)
- Matvørulæra A-stig (6 t/v)
- Smáverulívfrøði B-stig (4 t/v)
- Fyriskipan A-stig (4 t/v)

Umsøkjarar skulu hava prógv frá lærdum háskúla e.l., sum gevur førleika at undirvísa í lærugreinunum. Umsøkjarar við vinnu- og undirvísingarroyndum hava fyrimun.

Tímarnir verða løntir sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Yrkisfelag Studentaskúla- og HF-lærara um lærarar á Fiskivinnuskúlanum.

Umsókn skal skrivast á serligt umsóknarblað, sum fæst á Fiskivinnuskúlanum ella frá Mentamálaráðnum. Meira fæst at vita við at venda sær til skúlastjóran á Fiskivinnuskúlanum.

Umsóknir við ljósprentum av prógvskjølum o.ø. skulu vera skúlastjóranum í hendi í seinasta lagi mikudagin 30. apríl 2003.

FISKIVINNUSKÚLIN

Fiskivinnuskúlin
Postrúm 96
350 Vestmanna
Tlf. 42 45 73
fax 42 44 28
Teldupostur:
fiskvest@fiskvest.fo



**Bilførari**

Vit søkja eftir bilførara/servicumanni at byrja skjótast tilber.

Vit bjóða:
- eitt spennandi og fjølbroytt starv í eini vinnu, sum er í vøkstri.
- tryggar arbeiðsumstøður
- gott arbeiðsumhvørvi

Arbeiði umfatar í høvuðsheitum:
- avskipað og koyra vindeygu og hurðar út til kundan
- at taka mát og vegleiða kundan á staðnum
- servicera og gera smáar umvælingar

Vit vænta av tær:
- at tú ert fyrikomandi og álitandi
- at tú hevur royndir við timbur/snikkaraarbeiði
- at tú hevur koyrikort, evt. stóra koyrikortið
- at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt

Løn:
Løn verður sambært avtalu.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Heðin Poulsen tel. 33 21 77 ella 21 81 15

Vatnsoyra Snikkaravirki pf.
FO-385 Vatnsoyrar · Telefon 33 21 77 · Fax. 33 31 66
E-mail: vs-fg@h-window.fo · Homepage: www.h-window.fo



**Avloysari til skrivstovuna**

Ísambandi við at ein skrivstovukvinna fer barnsburðarfarloyvi, væntandi um ½ Mai, søknast vit eftir avloysara M/K, til skrivstovu okkara, at byrja skjótast tilberð. Møguliga niðursetta tíð.

Vit bjóða eitt spennandi starv í eini vinnu, sum er í vøkstri.

Arbeiðið umfatar í høvuðsheitum:
- at passa telefon
- at avgreiða ordrar
- at avgreiða post v.m.

Vit vænta av tær:
- at tú hevur skrivstovuútbúgving ella royndir á økinum.
- at tú hevur kunnleika til teldu
- at tú ert ágrýtin og røkin
- at tú ert fyrikomandi og álitandi

Løn:
Løn verður sambært nærri avtalu.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Heðin Poulsen tel. 21 81 15

Vatnsoyra Snikkaravirki pf.
FO-385 Vatnsoyrar · Telefon 33 21 77 · Fax. 33 31 66
E-mail: vs-fg@h-window.fo · Homepage: www.h-window.fo